Tórshavn, tann 28. apríl 2023
J.Nr.: LUM-16- 22/15694-56
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

um málsviðgerðina hjá Yrkisdeplinum í sambandi við eina førleikameting

Við skrivi, dagfest 29. august 2022, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> Tá eg klagaði Sjóvinnustýrið fyri ikki at ganga mínum ynski á møti um vinnubræv sum kokkur við handilsskipi, var tað tí at eg metti at gongdin í hesum máli var skeiv frá byrjan av. Yrkisdepilin fekk at vita, at eg skuldi brúka eitt vinnubræv sum kokkur við handilsskipi og bleiv eg førleikamettur soleiðis, at tað kundi geva mær sjóvinnubrævið.
> Tit hava fingið skjalið har tað stendur púra greitt, at eg lúki treytirnar fyri at fáa vinnubræv (handilsskip).
> Tað sum so hendir ímillum Yrkisdepilin og Sjóvinnustýrið, har ósemja er um førleikametingina, kann ikki vera eitt problem fyri meg. Yrkisdepilin hevur eina meining um, at førleikametingin av mær, har øll heildin verur tald við, so sum útbúgving, arbeiðsroyndir og prógv frá Tekniska Skúla, er nokk til eitt vinnubræv. Mær vitandi er tað akkurat tað, sum endamálið við eini førleikameting er. Sjóvinnustýrið hyggur bert eftir, um royndin á Tekniska Skúla í Klaksvík er á sama støði sum gastronom ella gastronomatstøðari. Eitt orð sum kokkayrkið og tulkingin av orðinum skilir partarnir. Frá byrjan av fingu Sjóvinnustýrið og Yrkisdepilin kunning um, at eg var útbúgvin bakari og ikki gastronom. Út frá hesum bleiv ætlanin løgd hvussu eg skuldi førleikametast.
> Eftir at hava verið ígjøgnum roynd á Tekniska Skúla og blivin førleikamettur, fekk eg (*frá Sjóvinnustýrinum, mín viðm.)* onki vinnubræv sum kokkur við handilskipi orsaka av, at eg ikki var útbúgvin gastronom, men bakari, sum eftir teirra meting ikki kemur undir kokkayrkið. Avgerðin undrar meg stórliga, tí teir vistu frá byrjan av, at eg var bakari og ikki gastronom.
> ..."

Klagan er framhald av klagu, dagfest 12. juli 2022. Tann klagan snúði seg um, at Sjóvinnustýrið hevði noktað klagaranum sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi. Avgerðin hjá Sjóvinnustýrinum varð kærd til Umhvørvis- og vinnumálaráðið (*nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið),* ið tann 1. november 2021 staðfesti avgerðina hjá Sjóvinnustýrinum við m.a. soljóðandi grundgeving:

> "...
> Fyri at fáa sveinabræv sum skipskokkur við fiskiskipi sambært § 41, stk. 2 krevst útbúgving sum gastronomiatstøðari, og fyri at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi sambært § 41, stk. 1 krevst sveinabræv innan kokkayrkið.
>
> Aftaná førleikametingina gjøgnum Yrkisdepilin er váttan fingin um, at kærarin lýkur førleikakrøvini, sum verða sett við útbúgvingarlok til gastronomiatstøðara, og harvið lýkur kærarin førleikakrøvini,

> sum verða sett í § 41, stk. 2 fyri at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur við fiskiskipum. Tað verða sett hægri førleikakrøv fyri at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur á handilsskipum enn á fiskiskipum, og Umhvørvis- og vinnumálaráðið metir ongan iva vera um, at kravið um "sveinabræv innan kokkayrkið" sbrt. § 41, stk. 1 ... merkir sveinabræv sum kokkur.
>
> Kærarin hevur ikki sveinabræv sum kokkur og er førleikamettur til at hava førleikar svarandi til gastronomiatstøðara. Umhvørvis- og vinnumálaráðið metir tí ikki, at grundarlag er fyri at seta til síðis avgerð Sjóvinnustýrisins um at nokta kæraranum sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipum, og verður avgerðin tí hervið staðfest.
> ..."

Umboðsmaðurin tók í sambandi við sína klagumálsviðgerð støði í kæruavgerðini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Umboðsmaðurin helt, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klagu klagarans. Hesa fatan grundaði umboðsmaðurin á, at umboðsmaðurin ikki hevði orsøk at finnast at tulkingini av § 41, stk. 1 í kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum, ið er endurgivin omanfyri sum partur av grundgevingini hjá ráðnum.

Viðgerðin hjá umboðsmanninum av hesum klagumáli snýr seg tí í høvuðsheitum um málsviðgerðina hjá Yrkisdeplinum í sambandi við førleikametingina, ið Sjóvinnustýrið nýtti sum grundarlag at nokta fyri at veita klagaranum sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi.

Yrkisdepilin hevur kunnað umboðsmannin um, at málsøkið "Førleikameting" tann 1. januar 2022 varð flutt frá Yrkisdeplinum til Undirvísingarstýrið. Undirvísingarstýrið hevur skipað økið undir Vegleiðingarstovuni, ið er deild undir Undirvísingarstýrinum. Av hesum ávum eru bæði Yrkisdepilin og Undirvísingarstýrið partur av viðgerðini hjá umboðsmanninum.

**Málsgongd**

Tann 16. juli 2019 sendi klagarin soljóðandi teldupost til Yrkisdepilin

> "...
> Eg eri komin í eina sera óhepna støðu viðvíkjandi starvi mínum. Eri útbúgvin bakari og sigli sum kokkur við skipi har manningartalið er 6 mans, og ætlanin er at veksa um manningartalið. Havi søkt sjóvinnustýrið um vinnubræv, men fingið noktandi svar við tí grundgeving, at tað skal vera ein gastronom útbúgving aftanfyri. Eg fekk sveinabræv sum bakari í ... Skúlagongdin var í ... Tað fyrsta árið í læritíðini var eg ein part í skúla har grundundirvísingin var tann sama sum kokkar fingu. Tá eitt ár var farið av lærutíðini, kundi eg so velja, um eg vildi vera kokkur ella bakari. ... Havi tosað við Sjóvinnustýrið har tey siga, at tit í Yrkisdeplinum møguliga kunnu hjálpa mær við hesum."

Eftirfylgjandi er, í høvuðsheitum, teldupostsamskifti, í tíðarskeiðnum 2019 til 2021, millum Yrkisdepilin og Tekniska Skúla í Klaksvík um, hvussu førleikametingin skal leggjast til rættis og avgreiðast.

Teldupostsamskiftið er ikki til fulnar endurgivið í hesum álitinum. Partur av teldupostsamskiftinum, ið verður mett viðkomandi fyri klagumálsviðgerðina, verður viðgjørt niðanfyri undir brotinum "Niðurstøða".

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 28. september 2022, varð klagan send Undirvísingarstýrinum til ummælis. Samstundis varð Undirvísingarstýrið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 22. november 2022 sendi Undirvísingarstýrið umboðsmanninum umbidnu skjølini í málinum umframt soljóðandi frágreiðing:

> **“Frágreiðing viðvíkjandi klagu um førleikameting**
>
> Løgtingsins umboðsmaður hevur, í sambandi við eina klagu frá A, biðið Yrkisdepilin (*nú Undirvisingarstýrið, mín viðm.*) um eina frágreiðing um viðgerðina av einari førleikameting innan gastronomatstøðaraútbúgving, ið fór fram á Tekniska skúla í Klaksvík í apríl 2021, og sum Yrkisdepilin var við til at fyrireika saman við skúlanum.
>
> A spurdi, eftir tilmæli/áheitan frá Sjóvinnustýrinum, í 2019, um møguleikan fyri at verða førleikamettur innan kokkayrkið. Hann ynskti at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur á handilsskipi. Matvøruútbúgvingin á Tekniska skúla í Klaksvík skuldi standa fyri sjálvari førleikametingini, og avgjørt varð, at hann skuldi førleikametast sambært kunngerð um gastronomatstøðaraútbúgving. Tað gekk ein tíð, áðrenn førleikametingin kundi verða framd, tí A var í vinnu á sjónum og bert heima í ávísum tíðarskeiðum.
> Førleikametingin skuldi avdúka, um A hevði teir førleikar, ið kravdust fyri at kunna fáa vinnubræv sum kokkur á handilsskipi.
>
> Í apríl 2021 varð farið undir at fyrireika sjálva førleikametingina og vika 17 í 2021 varð sett av til sjálva royndina.
>
> Royndin fór fram á tann hátt, at umsøkjarin í eina viku fekk møguleika at fyrireika eina fjølbroytta kokkauppgávu, ið m.a. fevndi um at fyrireika, gera og borðreiða 6 høvuðsrættir. At enda var ein roynd fyriskipað. Saman við prógvum og skjølum frá royndum í bæði bakara- og kokkayrkinum, var hetta grundarlagið undir førleikametingini og niðurstøðuni.
>
> Fyri sjálvari førleikametingini stóðu B, gastronomur, og D, deildarleiðari, báðir frá matvøruútbúgvingini á Tekniska skúla í Klaksvík.
>
> Niðurstøðan frá førleikametingini var, at *”Saman við ástøðiligu og verkligu førleikunum og teirri verkligu royndini verður mett, at A lýkur allar treytir sum skipskokkur á handilsskipi, og uppfyllir allar neyðugar treytir til at fáa endurnýggjað sítt vinnubræv."*
>
> Sum henda niðurstøða var orðað, bar ikki til hjá Sjóvinnustýrinum at taka støðu til umsóknina frá A um at fáa vinnubræv, tí tað sambært Sjóvinnustýrinum ikki framgekk nóg greitt í niðurstøðuni, hvørja útbúgving, førleikarnir hjá umsøkjaranum vórðu mettir upp ímóti. Tað var eitt mistak, at útbúgvingin, sum førleikametingin varð gjørd upp ímóti, ikki var nevnd í upprunaligu niðurstøðuni.
>
> Orðingin í niðurstøðuni varð tí broytt, so at tað framgekk, hvør útbúgving, talan var um, so at Sjóvinnustýrið fekk viðgjørt umsóknina frá A um vinnubræv og tikið avgerð. A fekk kunning um orsøkina til, hví orðingin í niðurstøðuni frá førleikametingini varð broytt. Tað var ikki gjørd ein nýggj førleikameting av A, tí grundarlagið undir førleikametingini var alla tíðina kunngerð um útbúgving til gastronomatstøðara.

Av tí at matvøruútbúgvingin á Tekniska skúla í Klaksvík ikki bjóðaði fullu gastronomútbúgvingina, og ikki metti seg at hava teir neyðugu førleikarnar tá, at førleikameta upp ímóti teirri fullu gastronomútbúgvingini, var bert møguligt at førleikameta upp ímóti gastronomatstøðaraútbúgvingini, ið skúlin bjóðar út.

M.a. tí varð A kunnaður um, at kokkaskúlin í Hjørring í Danmark, sum matvørudeildin á Tekniska skúla í Klaksvík hevur tætt samstarv við, møguliga kundi standa fyri einari førleikameting upp ímóti teirri fullu gastronomútbúgvingini. Tað skal eisini nevnast, at hetta var eftir, at orðingin í niðurstøðuni frá førleikametingini varð broytt.

Førleikametingin verður altíð gjørd við støði í kunngerð og skeiðslýsingum fyri útbúgvingina, og tí var ikki neyðugt at fara ígjøgnum eina nýggja førleikameting av A í sambandi við, at orðingin í niðurstøðuni varð broytt og nágreinað.

Tá tað í fyrru niðurstøðuni frá førleikametingini varð sagt, at tann førleikametti "lýkur allar treytir sum skipskokkur á handilsskipi", var hetta ein skeiv orðing, sum vit, ið varða av førleikametingini, hava ábyrgdina av. Yrkisdepilin boðaði A frá mistakinum, so skjótt Sjóvinnustýrið hevði gjørt vart við, at tey ikki kundu viðgera umsóknina og niðurstøðuna frá førleikametingini, tí har framgekk ikki, hvør útbúgving, talan var um.

Tá tað er Sjóvinnustýrið, ið nágreinar treytirnar fyri at útskriva vinnubræv, og í tí sambandi vísir til tær viðkomandi útbúgvingarnar, var neyðugt at orða niðurstøðuna frá førleikametingini av nýggjum, so at tað framgekk, hvør útbúgving, talan var um, ið førleikametingin var framd upp ímóti.

Tískil var orðingin í niðurstøðuni frá førleikametingini broytt til:
*"Saman við verkligu royndunum og ástøðiligu førleikunum, umframt teirri verkligu royndini, verður váttað, at A lýkur førleikakrøvini, sum verða sett við útbúgvingarlok til gastronomatstøðara."*

Sambært lóg um førleikameting, skal førleikametingin taka atlit at samlaðu førleikunum hjá tí einstaka, sum eru viðkomandi fyri at fara undir eina útbúgving ella arbeiði, og at støði verður tikið í førleikum, sum eru fingnir í skúlaskipanini, í arbeiðslívi, frítíðarvirksemi ella á annan hátt.

Førleikametingin hevur harumframt, sambært lógini sum mál, at økja um flytførið á arbeiðsmarknaðinum.

Tí hevur tað talt við í metingini av A, at hann hevur drúgvar og fjølbroyttar royndir innan matvøruyrkið, bæði sum bakari og kokkur, sum sjálvstøðugur vinnurekandi við egnum bakaríi í meira enn fimm ár, sum kondittari umborð á ferðamannaskipinum Norrønu, umframt at hann hevur sveinabræv sum bakari, ið fevnir um meginpartin av teirri grundleggjandi skúlagongdini, sum er innan kokkayrkið, við próvtølum langt yvir miðal.

*Kærumøguleikar sambært lóg um førleikameting*
Tá niðurstøða frá førleikameting verður gjørd, er vanligt at prenta kunnandi tekst um kærumøguleikar, sambært § 8 a í lógini um førleikameting, á baksíðuna á niðurstøðuni. Tann teksturin er soljóðandi:

Niðurstøða um førleikameting sambært hesi løgtingslóg kann verða kærd til landsstýrismannin sambært reglunum í viðkomandi útbúgvingarlóg. Um kært verður um tann verkliga partin av niðurstøðuni, tá talan er um førleikameting innan yrkisútbúgvingar, verður kæran viðgjørd sambært reglunum í § 23, stk. 5 í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar.

Av misgáum kom hesin tekstur ikki við í niðurstøðuna hjá A.

> A hevur verið kunnaður um kærumøguleikarnar í sambandi við førleikametingina í munnliga samskiftinum, sum hevur verið millum A og Yrkisdepilin. Spurnartekin kann tó verða sett við, um A hevur fingið nóg góða vegleiðing um kærumøguleikarnar, sum eru sambært § 8 a í løgtingslóg um førleikameting, av tí at kæruvegleiðingin ikki var skrivlig.
>
> Okkum vitandi hevur A ikki kært avgerðina ella málsviðgerðina hjá Yrkisdeplinum til landsstýrismannin og heldur ikki til kærunevnd, í sambandi við at kært verður um tann verkliga partin í niðurstøðuni, so sum lóg um førleikameting annars fyriskrivar."

Við telduposti, dagfestur 30. november 2022, vórðu viðmerkingarnar hjá Undirvísingarstýrinum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 14. desember 2022 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Vánalig viðgerð av bæði Sjóvinnustýrinum og Yrkisdeplinum, ella rættari sagt ein fúl etandi skomm. Sjóvinnustýrið ráddi mær til, at venda mær til Yrkisdepilin fyri at fáa eina førleikameting, soleiðis at eg kundi fáa vinnubræv sum kokkur við handilsskipi.
>
> Eg vil gera púra greitt, at eg ongantíð bleiv førleikamettur innan gastronomatstøðara útbúgvingina.
>
> Endamálið við førleikametingini var, at eg skuldi fáa vinnubræv sum kokkur við handilsskipi, og tað er eisini skjalprógva.
>
> Yrkisdepilin fekk at vita, frá fyrsta degi, at eg skuldi førleikametast soleiðis, at eg kundi fáa eitt vinnubræv sum kokkur við handilsskipi, og har vóru allar mínar arbeiðsroyndir og mín útbúgving innan kokkayrkið tikin við í førleikametingina, hetta fekk Sjóvinnustýrið eisini at vita.
> Vil eisini gera vart við, at eg ongantíð bleiv kunnaður av Yrkisdeplinum um, hvussu eg møguliga kundi kæra hettar, hvørki skrivligt ei heldur munnligt.
>
> Fyrst var tað orðingin í kunngerðini kokkayrkið, sum var trupulleikin fyri at fáa vinnubrævið, tí Sjóvinnustýrið tulkaði tað øðrvísi enn øll onnur.
>
> Síðani var tað orðingin í førleikametingini, har Sjóvinnustýrið metir, at tað ikki skal standa, at eg eri førleikamettur til at fáa vinnubræv sum kokkur við handilsskipi, men sum gastronomatstøðari.
>
> Her eru lógir sum siga, at undantøk kunnu gerast, men hetta vil Sjóvinnustýrið ikki hoyra talan um. Eg havi brúkt nógva tíð og orku uppá hetta til onga nyttu og hevur tað eisini haft ein fíggjarligan miss fyri meg. (*klagarin upplýsti eftirfylgjandi fyri umboðsmanninum, at hann hevði verið fyri fíggjarligum missi, tí hann ikki fekk søkt eitt meiri lønandi starv)".*

Tann 9. januar 2023 bað umboðsmaðurin Tekniska Skúla í Klaksvík um øll skjøl í málinum, fyri at kunna seg nærri um málið.

Tann 11. januar 2023 sendi Tekniski Skúli í Klaksvík avrit av skjølum.

Tann 13. januar 2023 sendi umboðsmaðurin nágreinandi spurningar til Undirvísingarstýrið, ið vórðu svaraðir tann 27. januar 2023.

Svarini, ið Undirvísingarstýrið gav umboðsmanninum, eru ikki endurgivin í hesum álitinum, men eru partur av viðgerðini niðanfyri undir brotinum "Niðurstøða", har tað verður mett viðkomandi.

Tann 17. februar 2023 kunnaði umboðsmaðurin Undirvísingarstýrið og klagaran um, at umboðsmaðurin var farin undir endaligu viðgerðina av málinum.

**Lóggávan**

Málsøkið "Førleikameting" er skipað í løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting og kunngerð nr. 9 frá 2. februar 2018 um førleikameting.

Uppskotið til løgtingslógina er gjørt við støði í tilmælinum "Førleikameting og førleikamenning", ið ein arbeiðsbólkur umboðandi partarnar á arbeiðsmarknaðinum og Føroya landsstýri, lat úr hondum í 2013.

Tilmælið, hvørs innihald er endurgivið í almennu viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting, sigur m.a. at:

> "Yvirskipaða endamálið við tilmælinum er at geva politisku skipanini innlit í, hvussu ein skipan við førleikameting og førleikamenning kann setast í verk í Føroyum. Í stuttum snýr førleikameting seg um at orða, skjalfesta (dokumentera) og viðurkenna teir førleikar, sum ein borgari hevur. Førleikamenning er við støði í førleikametingini at gera eina ætlan fyri menning, sum viðkomandi kann fara undir. Endamálið við førleikameting er at geva fólki við lítlum ella ongum formellum førleikum, tvs. ófaklærdum, møguleika at fáa mett sínar fakligu førleikar, ið tey hava ognað sær í arbeiðslívi ella á annan hátt, so tey kunnu fara undir førleikamenning/útbúgving. Eisini er endamálið at geva fólki møguleika at endurútbúgva seg, so tey kunnu royna seg á øðrum økjum á arbeiðsmarknaðinum. Hetta skapar størri flytføri hjá tí einstaka og fyri arbeiðsmarknaðin sum heild og gevur persónum, sum verða førleikamettir og førleikamentir, betri møguleika at vera verandi á arbeiðsmarknaðinum, hóast fortreytirnar broytast. Umframt hetta kunna vera fleiri, sum hava drúgvar royndir og viðkomandi skeið, sum eisini ynskja at nema sær hægri útbúgving, ið kundu fingið gagn av eini førleikametingarskipan.
> ...
> ... Mælt verður til at seta í starv ein samskipara á einum av verandi stovnum, sum hevur til endamáls at kunna, vegleiða, gera uppsøkjandi arbeiði kring landið og vera virkin partnari, tá ítøkiligar verkætlanir innan ávís yrki skulu setast í verk.
> ..."

Niðanfyri verða greinar í omanfyrinevndu lóggávu, ið hava týdning fyri klagumálsviðgerðina, lýstar. Talan er í høvuðsheitum um greinar viðvíkjandi leiklutinum hjá tí, ið vegleiðir og samskipar tilgongdina við førleikameting og greinar viðvíkjandi leiklutinum hjá tí ella teimum, ið standa fyri førleikametingini.

*Løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting*

*Samskiparin (mín. viðm.)*

**§ 4.** Førleikameting er ein skipað tilgongd, sum verður framd í samráð og í samstarvi við ein samskipara. Metingin fatar um upplýsing, vegleiðing, skjalfesting, kortlegging og meting.
...

*Serligu viðmerkingarnar til § 4, stk.1.*

*Stk. 1.* Skipanin við førleikameting fevnir um eina tilgongd, har viðurskiftini hjá tí, sum ynskir at verða førleikamettur, verða greinað. Viðkomandi vendir sær til samskiparan og lýsir saman við honum sína støðu og leggur við skjøl, sum metingin kann verða grundað á. Samskiparin upplýsir um tilgongdina við førleikameting, metir um ásett krøv, og um grundarlag er fyri at fara víðari við einari tilgongd at førleikameta viðkomandi. Talan er um vegleiðing, skjalfesting og kortlegging av teimum førleikum, sum persónurin hevur í sínum viðføri. Metingin er í mun til ávísa útbúgving, sum viðkomandi ynskir, ella sum samskiparin heldur vera møguliga hjá viðkomandi. Ætlanin er, at skipanin skal vera gjøgnumskygd og liðilig, og tí eigur vegleiðingin og hjálpin at vera so ítøkilig sum gjørlig.

**§ 8.** Mentamálaráðið setir starvsfólk at umsita og samskipa skipanina og orða mannagongdir í sambandi við førleikameting.
*Stk. 2.* Skipanin fevnir um vegleiðing, sum skal tryggja eina skipaða ætlan og tilgongd fyri hvønn einstakan, sum verður førleikamettur.

*Serligu viðmerkingarnar til § 8*

*Stk. 1 og 2.* Til tess at skipa fyri og vera sambindingarlið millum persónin, sum ynskir førleikameting, og teir útbúgvingarstovnar, sum fremja førleikametingina, verður ein samskipari settur. Hesin persónur verður inngongdin í skipanina og kemur at fylgja tí, sum ynskir at verða førleikamettur, frá byrjan til enda. Uppgávurnar hjá samskiparanum verða m.a. at orða mannagongdir bæði fyri brúkaran, útbúgvingarstovnarnar og vegleiðararnar á skúlunum, so at skipanin verður bygd upp á ein hátt, har øll fáa somu og nøktandi viðgerð. ...
Samskiparin skal vera tøkur gjøgnum alla tilgongdina hjá tí, sum verður førleikamettur. Talan verður um eitt slag av lestrarvegleiðing, umframt at røkja skipanina og tryggja, at alt fer rætt fram. Samskiparin eftirkannar skjølini og vegleiðir um, hvussu farast skal fram. T.d. skal samskiparin tryggja, at allir viðkomandi førleikar verða greinaðir, eisini hóast tann, sum ynskir førleikameting, ikki sjálvur er greiður yvir, at talan er um viðkomandi førleikar. Hetta verður gjørt við m.a. samtalum. ...”

## *Førleikametarin (mín viðm.)*

**§ 5.** Fakkøn á viðkomandi útbúgvingarøki greina og staðfesta verkligu og ástøðiligu førleikarnar ...
*Stk. 2.* Ítøkilig ætlan verður gjørd fyri, hvussu førleikamettir persónar lúka málini í viðkomandi útbúgving.
*Stk. 3.* Meting og viðurkenning av førleikum verða skjalfest og váttað, og førleikametti fær vegleiðing um, hvussu farast skal víðari í mun til ítøkiligu útbúgvingina.
...

*Serligu viðmerkingarnar til § 5*

*Stk. 1.* Greining og staðfesting av førleikunum er sjálv førleikametingin. Hetta verður gjørt fyri ávísu útbúgvingina og er tí ymisk frá útbúgving til útbúgving. Tann fakkøni kann vera lærari á ávísu útbúgvingini ella yrkislærdur við royndum innan ávísa yrkisgrein. Ynskiligt er, at tá førleikamett verður á yrkisútbúgvingarøkinum, at skoðanarmeistarar eru við at gera metingina.
...

*Stk. 2.* Ein ítøkilig útbúgvingar- ella menningarætlan verður gjørd fyri førleikametta, hendan greiðir frá, hvønn tørv viðkomandi hevur fyri at náa málinum fyri viðkomandi útbúgving. Ein tíðarætlan kann eisini leggjast hjá, hvussu og nær menningin kann fara fram.

*Stk. 3.* Tann førleikametti skal fáa eina váttan um, hvørjar førleikar hesin hevur í mun til ta útbúgving, hesin ætlar sær at fara undir. Eisini verður gjørd ein tíðarætlan, ið førleikametti kann nýta í síni víðari menningartilgongd.

*Kunngerð nr. 9 frá 2. februar 2018 um førleikameting*

*Karmar fyri førleikameting*

**§ 2.** Einstaka førleikametingin verður fyriskipað og framd á einum av landsstýrismanninum góðkendum stovni og í samstarvi við viðkomandi útbúgvingarstovnar.
*Stk. 2.* Stovnurin, ið fyriskipar og fremur førleikametingina, metir og tekur avgerð um grundarlag fyri førleikameting, leggur til rættis og skipar fyri, at einstaklingar verða førleikamettir, ger av, hvørjum útbúgvingum ella yrkisgreinum, førleikamett verður í, og nær hetta verður gjørt.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin veitir útbúgvingarstovnum, viðkomandi fakpersónum og teimum, ið ynskja at verða førleikamett, vegleiðing og ráðgeving, og orðar mannagongdir í sambandi við førleikametingina.

*Samskiparin (mín viðm.)*

**§ 3.** Ein samskipari samskipar einstøku førleikametingina og vegleiðir tann, ið verður førleikamettur, sbr. § 4, stk. 1 og 5 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Samskiparin ger og leggur til rættis, saman við tí, ið verður førleikamettur, skjalamappu, sum er persónlig, við upplýsingum um arbeiðsroyndir, skeið og skúlagongd hjá viðkomandi. Eisini kann skjalamappan fevna um metingarskjal frá aðrari førleikameting, sbr. § 4, stk. 3 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Tann, ið verður førleikamettur skal virkin taka lut í at fáa innihaldið í skjalamappuni so fullfíggjað, sum til ber, og hevur ábyrgdina av, at upplýsingarnar í mappuni eru rættar.

**§ 4.** ...
*Stk. 4.* Samskiparin hevur neyvt samskifti við og vegleiðir og stuðlar tí, ið verður førleikamettur í allari tilgongdini, og skal síggja til, at allir viðkomandi førleikar verða skjalfestir.

**§ 7.** ...
*Stk. 3.* Umsøkjarin verður kunnaður um tilgongdina í sambandi við førleikametingina og um møgulig úrslit. Tann, ið verður førleikamettur skal fáa greiða afturboðan um støðu sína í sjálvari tilgongdini og hóskandi vegleiðing.
*Stk.* 4. Gjørd verður ein skanning, har mett verður um støðu umsøkjarans í mun til tey krøv, sum eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum og í avvarðandi útbúgving, og um viðkomandi er skikkaður at verða førleikamettur.
...

**§ 11.** Áðrenn tann einstaki tekur avgerð um at verða førleikamettur, skal hann verða kunnaður um møguliga niðurstøðu frá førleikametingini, verða upplýstur um, hvat málið við førleikametingini er, og verða kunnaður um leiklutin hjá tí fakpersóni, ið førleikametir.
*Stk. 2.* Einstaklingurin skal verða kunnaður um, hvar hann er staddur í einari førleikametingartilgongd.

*Førleikametarin (mín. viðm.)*

**§ 8.** Førleikametari, sum er útbúgvin í viðkomandi yrki, skal gera eftirlitsskrá, samsvarandi leiðreglum um mál og førleikar, og stýrir staðfestingartilgongdini, tá ið førleikamett verður, og skal orða niðurstøðuna.
...

**§ 9.** Ein, ið er førleikamettur, skal hava niðurstøðuna frá førleikametingini skrivliga og harumframt fáa vegleiðing um næstu stig, ið verða tikin.
*Stk. 2.* Førleikametarin hevur ábyrgdina av at orða niðurstøðuna frá førleikametingini, sum leiðsla útbúgvingarstovnsins váttar, sbr. § 5, stk. 3 í løgtingslógini.
...

**Niðurstøða**
Viðgerð mín av hesi klagu snýr seg um málsviðgerðina og handfaringina hjá Yrkisdeplinum av førleikameting av klagaranum í sambandi við, at hann ynskti at útvega sær sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi.

Klagan er framhald av klagu, dagfest 12. juli 2022, um, at Sjóvinnustýrið hevði noktað klagaranum sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi, tí klagarin ikki var útbúgvin kokkur, men bakari. Umhvørvis- og vinnumálaráðið (*nú Uttanríkis- og vinnumálaráðið*) staðfesti avgerðina hjá Sjóvinnustýrinum og tulkingina hjá Sjóvinnustýrinum, at orðingin "sveinabræv innan kokkayrkið" í § 41, stk 1 í kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum skal fatast sum sveinabræv sum kokkur.

Eg havi onga viðmerking til hetta.

***Gongdin í førleikametingini***
Førleikametingin av klagara varð framd av Tekniska Skúla í Klaksvík og samskipað av Yrkisdeplinum.

Í innleiðandi teldupostinum til Yrkisdepilin, dagfestur 16. juli 2019, skrivaði klagarin m.a., at hann hevði søkt Sjóvinnustýrið um vinnubræv til handilsskip, men hevði fingið noktandi svar við tí grundgeving, "*at tað skal vera ein gastronom útbúgving*". Sambært skjølum í málinum er samskiftið eftir hetta millum Yrkisdepilin og Tekniska Skúla í Klaksvík um tilgongdina at skipa fyri førleikameting av klagaranum.

Tann 20. november 2019 váttaði Yrkisdepilin í telduposti til Tekniska Skúla í Klaksvík, at talan var um at førleikameta klagaran við tí endamáli, at hann kundi fáa "*prógv sum gastronomhjálpari við próvtøku" (gastronomatstøðari, mín viðm.)*

Tann 9. februar 2021 skrivaði Yrkisdepilin soljóðandi teldupost til Tekniska Skúla í Klaksvík um framferðarháttin í sambandi við, at skipast skuldi fyri førleikameting av klagaranum.

> "...
> Aftaná førleikametingina og próvtøkuna verður niðurstøða skrivað, har greitt framgongur, at A er førleikamettur upp ímóti gastronomatstøðaraútbúgvingini og hevur teir førleikar, sum útbúgvingin krevur. Hetta svarar sostatt til skipskokk, sum kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum ásetir.
> Hetta skjal (prógvið, váttanin, niðurstøðan frá førleikametingini) verður brúkt til at innplasera A mótvegis krøvunum í kunngerðini, og sum Sjóvinnustýrið heldur seg til í sambandi við kokkin á umrødda fiskiskipi.
> Hetta gevur ikki rætt til vinnubræv sum kokkur við handilsskipi, tí tá skal hann vera útbúgvin gastronomur."

Soleiðis sum málið er lýst, er einki skrivligt samskifti aftur millum Tekniska Skúla í Klaksvík og Yrkisdepilin fyrrenn tann 29. apríl 2021, tá Tekniski Skúli í Klaksvík sendi Yrkisdeplinum avrit av niðurstøðuni av førleikametingini, ið vísti, at klagarin var "*førleikamettur innan kokkayrkið*

*sum skipskokkur við handilsskipi"* og at klagarin "*lýkur allar treytir sum skipskokkur við handilsskipi"*.

Sum málið er lýst, orðar Yrkisdepilin eftirfylgjandi uppskot til neyðugar tillagingar til hesa niðurstøðu, ið Tekniski Skúli í Klaksvík góðtekur. Yrkisdepilin ger í hesum sambandi onga viðmerking til, at niðurstøðan frá førleikametingini, ið Tekniski Skúli í Klaksvík hevur gjørt, greitt er í andsøgn við teldupostin, ið Yrkisdepilin sendi Tekniska Skúla í Klaksvík, dagfestur 9. februar 2021.

Skjøl í málinum vísa, at Yrkisdepilin eftir hetta var í samskifti við Sjóvinnustýrið um niðurstøðuna frá førleikametingini, dagfest tann 29. apríl 2021. Tann 17. mai 2021 boðaði Yrkisdepilin Sjóvinnustýrinum frá, at Yrkisdepilin hevði broytt niðurstøðuna soleiðis, at hon ikki longur æt "*førleikameting innan kokkayrkið" (gastronom, mín viðm.)* men "*førleikameting innan útbúgving til gastronomatstøðara"*. Skjøl vísa, at Yrkisdepilin frammanundan hevði lagt hesa broyting í niðurstøðuni fram fyri Tekniska Skúla í Klaksvík. Onki er tó skjalfest í málinum, hvørt Tekniski Skúli í Klaksvík hevði nakrar viðmerkingar til broytingina.

***Skyldan at vegleiða***

Skyldan at vegleiða er ásett bæði í §§ 4 og 8 í løgtingslóg nr. 67 frá 15. mai 2014 um førleikameting (hereftir lóg um førleikameting) og í §§ 3, 4, 7 og 11 í kunngerð nr. 9 frá 2. februar 2018 um førleikameting (hereftir kunngerð um førleikameting).

Sambært hesum greinum, er skyldan at vegleiða hjá tí, ið er settur sum samskipari, smb. § 8 í lóg um førleikameting. Soleiðis sum málið er lýst, umboðaði samskiparin Yrkisdepilin (*nú Undirvísingarstýrið),* ið hevði ábyrgdina av førleikametingini, smb. § 2, stk. 1 og 2 í kunngerð um førleikameting.

Skyldan at vegleiða hjá samskiparanum verður í lóggávuni lýst at fevna vítt. Í serligu viðmerkingunum til § 8 í lóg um førleikameting verður uppgávan m.a. allýst sum at:

> "Samskiparin skal vera tøkur gjøgnum alla tilgongdina hjá í, sum verður førleikamettur. Talan verður um eitt slag av lestrarvegleiðing, umframt at røkja skipanina og tryggja, at alt fer rætt fram."

Í § 7, stk. 3 og 4 í kunngerð um førleikameting er ásett:

> "*Stk. 3.* Umsøkjarin verður kunnaður um tilgongdina í sambandi við førleikametingina og um møgulig úrslit. Tann, ið verður førleikamettur skal fáa greiða afturboðan um støðu sína í sjálvari tilgongdini og hóskandi vegleiðing.
>
> *Stk. 4*. Gjørd verður ein skanning, har mett verður um støðu umsøkjarans í mun til tey krøv, sum eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum og í avvarðandi útbúgving, og um viðkomandi er skikkaður at verða førleikamettur."

Sambært teldupostinum frá Yrkisdeplinum til Tekniska Skúla í Klaksvík, dagfestur tann 9. februar 2021, var Yrkisdepilin greitt vitandi um, hvørjar møguleikar ein førleikameting kundi geva klagaranum, og hvørjar avmarkingar vóru. Sum málið er lýst, vóru Yrkisdepilin og Tekniski

Skúli í Klaksvík, tann 20. november 2021, komnir ásamt um, at klagarin kundi verða førleikamettur og fáa prógv sum gastronomatstøðari við próvtøku.

Eg haldi, at Yrkisdepilin, vísandi til omanfyrinevnda teldupost frá klagaranum, dagfestur 16. juli 2019, átti at vita, at tað var ein avgerandi fortreyt fyri klagaran, at ein møgulig førleikameting skuldi fáa tað úrslit, at klagarin leyk førleikakravið til sjóvinnubræv sum skipskokkur við handilsskipi. Yrkisdepilin átti tí skjótast gjørligt at vegleitt klagaran um, at tann førleikameting, ið Tekniski Skúli í Klaksvík kundi bjóða, fór at gera tað møguligt hjá honum at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur á fiskiskipi sbrt. § 41, stk. 2 í omanfyrinevndu kunngerð, men ikki sum skipskokkur á handilsskipi sbrt. § 41, stk. 1 í somu kunngerð.

Vísandi til omanfyristandandi eri eg av tí fatan, at Yrkisdepilin ikki helt sína skyldu at vegleiða klagaran í sambandi við, at stovnurin fyriskipaði og framdi førleikameting av honum.

***Viðgerðin av niðurstøðuni um førleikameting***
Sum víst er á omanfyri, hevði Yrkisdepilin ábyrgdina av at fyriskipa og fremja førleikametingina.

Sambært lóg um førleikameting og kunngerð um førleikameting lá ein partur av útinningini av førleikametingini hjá Yrkisdeplinum, t.e. í høvuðsheitum tær vegleiðandi og samskipandi uppgávurnar, meðan ein partur lá hjá tí útbúgvingarstovni, ið Yrkisdepilin samstarvaði við, t.e. uppgávurnar hjá fakkøna partinum, ið stendur fyri at gera førleikametingina á staðnum. Í hesum føri var fakkøni parturin Tekniski skúli í Klaksvík.

Í § 5, stk. 1 í lóg um førleikameting og §§ 8 og 9 í kunngerð um førleikameting er m.a. ásett, at tað eru fakkøn, ið greina og staðfesta verkligu og ástøðiligu førleikarnar hjá tí, ið verður førleikamettur, og orða niðurstøðuna frá førleikametingini.

Í ítøkiliga málinum tók Yrkisdepilin tó stig til og broytti orðingarnar í niðurstøðuni frá førleikametingini.

Eg haldi, at talan var ikki um smáar broytingar, t.d. málsligar ella rætting av vantandi tilvísingum v.m., men hinvegin um eina grundleggjandi broyting av orðingini í niðurstøðuni soleiðis, at hon ikki longur var grundað á gastronomútbúgvingina, men gastronomatstøðaraútbúgvingina, ið er ein munandi øðrvísi útbúgving.

Eg haldi tað vera átaluvert, at Yrkisdepilin ikki gav sær far um ella setti spurnartekin við, at niðurstøðan frá førleikametingini, ið Tekniski Skúli í Klaksvík sendi Yrkisdeplinum tann 29. apríl 2021, greitt var í andsøgn við teldupostin, ið Yrkisdepilin stutt frammanundan, tann 9. februar 2021, hevði sent Tekniska Skúla í Klaksvík.

Vísandi til omanfyrinevnda uppgávubýti millum Yrkisdepilin og Tekniska Skúla í Klaksvík, undrist eg á, at Yrkisdepilin átók sær uppgávuna at broyta orðingarnar í niðurstøðuni frá førleikametingini, serliga tá talan var um eina so umfatandi broyting.

***Viðmerkingar til ógreiða lóggávu***
Sambært § 8 í lóg um førleikameting er tað "*Mentamálaráðið"*, ið "*setir starvsfólk at umsita og samskipa skipanina..."*

Eg haldi tað vera óheppið, at lógin í hesum høpi vísir til eitt ávíst *(fyrrverandi)* stjórnarráð, tá haft verður í huga, at hesi við jøvnum millumbilum verða umskipað, og vísandi til § 33, stk. 1 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, har ásett er, at løgmaður býtir málsøkini millum landsstýrismenninar. Sambært nýggjastu fráboðan um býti av málsøkjum (Fráboðan nr. 164 frá 22. desember 2022 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninar) er málsøkið "Førleikameting" lagt til landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum.

§ 8 í lóg um førleikameting leggur ábyrgdina at umsita og samskipa skipanina við førleikametingum til ein samskipara settan av Mentamálaráðnum, meðan kunngerðin um førleikameting í § 2, stk. 1 og 2 ásetir, at einstaka førleikametingin verður fyriskipað og framd á einum av landsstýrismanninum góðkendum stovni og í samstarvi við viðkomandi útbúgvingarstovnar.

Eg haldi, at tey viðurskifti, ið eru ásett í § 2, stk. 1 og 2 í kunngerð um førleikameting eru ógreið í mun til lógina um førleikameting og í mun til, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina at fyriskipa og samskipa førleikametingar. Viðurskiftini áttu eftir mínum tykki at verið skipaði í lóg. Hesa fatan grundi eg á, at talan eftir mínum tykki er um grundleggjandi reglur, ið áseta ein yvirskipaðan karm kring førleikameting.

Í "Rundskriv um lógarsmíð" frá 2019, s. 48, stendur m.a. soleiðis um áseting av grundleggjandi reglum:

> "...grundleggjandi reglur eiga ikki at ásetast í kunngerð. Hóast ein heimild í løgtingslóg kann vera heilt víð, so eiga grundleggjandi reglur ikki at ásetast í kunngerð, tí hetta er ikki í tráð við § 34, 1. pkt. í stýrisskipanarlóg Føroya. Kunngerðir kunnu sostatt bert nágreina tað, sum longu er ásett í løgtingslógini. Ásetingar um grundleggjandi reglur fyri borgaran, vinnulív o.o. skulu standa í løgtingslógini."

Um ásett hevði verið um hesi viðurskiftini í lóg um førleikameting, hevði í serligu viðmerkingunum borið til at lisið um innihaldið og ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast.

Í § 2, stk. 3 í kunngerð um førleikameting er ásett, at landsstýrismaðurin veitir "*teimum, ið ynskja at verða førleikamett, vegleiðing og ráðgeving"*.

Í § 11 og § 7, stk. 3 í kunngerð um førleikameting er ásett um kunning og vegleiðing av tí, ið verður førleikamettur, eins og § 7, stk. 4 ásetir at "*Gjørd verður ein skanning, har mett verður um støðu umsøkjarans í mun til tey krøv, sum eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum og í avvarðandi útbúgving, og um viðkomandi er skikkaður at verða førleikamettur."*

Eftir míni meting sæst ikki greitt í kunngerðini, hvar skyldan at ráðgeva og vegleiða teimum, ið ynskja førleikameting, liggur. Tá talan er um greinar í kunngerð, ber ikki til at lesa nærri í kunngerðini, hvat ætlanin við teimum er, ella hvussu tær skulu skiljast. Til tess at beint møguligan tulkingariva av vegnum átti hetta at verið greiðari ásett.

***Samanumtøka***

Samanumtikið haldi eg, at málsviðgerðin hjá Yrkisdeplinum í sambandi við førleikametingina av klagaranum als ikki hevur verið nøktandi. Her hugsi eg serliga um skylduna hjá Yrkisdeplinum at vegleiða í sambandi við, at førleikametingin varð fyriskipað og framd, umframt tað óvirkni, ið Yrkisdepilin sýndi, tá Tekniski Skúli í Klaksvík sendi Yrkisdeplinum niðurstøðuna frá førleikametingini, dagfest 29. apríl 2021, sum greitt var í andsøgn við teldupostin, ið Yrkisdepilin hevði sent stutt frammanundan, tann 9. februar 2021.

Eg fari samanumtikið at geva Undirvísingarstýrinum og Yrkisdeplinum, ið tá varðaði av málsøkinum “Førleikameting”, eina átalu fyri handfaringina og málsviðgerðina av førleikametingini av klagaranum.

Eg fari eisini at senda landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum eitt skriv, har eg fari at mæla honum til at hyggja at ógreiðuni í lóg um førleikameting og kunngerð um førleikameting, í mun til tær viðmerkingar, ið eg havi ført fram í hesum áliti.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður